UNITED seafood

# Maskinmaður

P/F Føroya Fiskavirking søkir eftir maskinmanni til virkið í Tórshavn.

P/F Føroya Fiskavirking Tórshavn framleiður serliga tosk og upsa. Vørurnar ið virkaðar verða eru á høgum góðskustigið og fevna um m.a. catering og retail vørur eins og frystar ídnaðarvørur. Arbeiðið á Fiskavirking í Tórshavn fer fram sambært innaneftirlitsskipan.
Í 2003 virkaði virkið um 5.000 tons av rávøru, og uml. 3000 tons av góðskaðum vørum

**Uppgávurnar hjá maskinmanninum verða m.a.:**
- Røkja maskinur á virkinum
- Røkja viðlíkahaldsætlan virkisins

**Krav er at umsøkjari hevur:**
- Prógv sum maskinsmiðjur

**Fyrimun hevur umsøkjari ið hevur:**
- Góðan førleika innan el-skipanir
- Kunnleika til flakamaskinur
- Kunnleika til teldunýtslu
- Royndir frá líknandi arbeiði

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt framkomið fakligt umhvørvi
- Eitt virkið og framkomið framleiðsluumhvørvi
- Løn sambært avtalu

Vit kunna bjóða eitt arbeiði í mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum.
Umsóknarfreistin er 28. juni.
Allar umsøknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Ynski er at viðkomandi kann byrja sum skjótast.

Um áhugi er fyri hesum starvi so kunna tygum taka samband við :

**UNITED SEAFOOD,**
**P/F Føroya Fiskavirking**
att: Klæmint Klein
Postboks 218 · FO - 110 Tórshavn, Føroyar
Telefon 355555 · Telefax 312631



# Skifer til sølu

Umleið 200 til 300 m³ av sorteraðum skifer er til sølu fyri sámuligan prís.

Kann brúkast til tak, klæðing av betonggarði, tún o.a.

**Ring til 21 38 00**

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Lærari til el-deildina

Starvið, sum er **tíðaravmarkað** til 1/2 ár, umfatar undirvísing á el-deildini.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum eletrikari og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Fyrimunur er at hava prógv sum el-installatørur. Neyðugt er at umsøkjarin hevur hollan kunnleika til nýggjastu tøknina á el-økinum. Eisini er áhugi fyri støddog alisfrøði, og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

*Á el-deildini starvast 5 lærarar í føstum starvi, umframt tímalærarar og verkstaðarhjálpari. Næmingarnir læra til elektrikara og ganga í skúla í 55 vikur, ella eru SIT-næmingar, sum ganga í skúla í 1 ella 2 ár.*

Løn:
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Starvið skal setast 9. august 2004.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2004.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Sørin Hansen, leiðari lærara á el-deildini, á tlf. 31 19 57 ella 22 37 28.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postmoga 239
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 311957 · Telefaks +298 316621
e-mail: tst@tst.fo

STUDENTAR 1994

*Nú er tann tíðin komin!!!*

*Fríggjakvøldið tann 23. juli 2004 verður veitsla fyri studentar 1994 í kantinuni í Hoydølum.*

*Fyrireikingarnar eru í gongd, og tað er umráðandi hjá fyrireikarunum at vita, hvør kemur við. Um tú hevur hug at verða við, send so beinanvegin tína tilmelding til torkil@torkil.net*

*Tilmeldingarfreistin er tann 23. juni 2004. Skotbráið er stutt, so tí er bert at fara til telduna beinanvegin og melda seg til*

*Vit síggjast - allir studentar 1994*

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Kvívíkar skúli

## søkir eftir lærara til skúlaárið 2004/2005

Søkt verður eftir lærara, til eitt tíðaravmarkað starv við Kvívíkar Skúla, skúlaárið 2004/2005.
Starvið er umleið 15 tímar um vikuna.

**Førleikakrøv:**
Lærara, ið kann undirvísa í øllum lærugreinum.

**Um skúlan:**
Kvívíkar Skúli er ein fýraflokkaður skúli við næmingum frá 1. til 7 árgang. Næmingatalið komandi ár er 50. Fimm lærarar eru við skúlan og kemur tú at vera ein teirra. Skúlin er útgjørdur við fimleikarahøll, svimjihyli og telduhøli.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meir fæst, at vita hjá skúlaleiðaranum, Bjarna Heinesen, telefon nr. 421291 ella fartlf. 211504.

Umsóknir við prógvi og viðmælum skulu sendast til Kvívíkar Skúla í seinasta lagi mánadagin 28. juni 2004.

**Kvívíkar Skúli**
Att: Bjarni Heinesen
340 Kvívík

# Nólsoyar skúli

Søkt verður eftir lærara til komandi skúlaár. Tímatalið verður væntandi 26 t/v vegna avlopstímar.

Starvið, sum er tíðaravmarkað skúlaárið 2004/05, er lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá skúlaleiðaranum, tlf. 327023 ella 327033.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. juni.

**Nólsoyar skúlastýri**
v/ Annu Marnu Holm
FO-270 Nólsoy

KEYP SPORTSFELGUR...
LÆTT OG TRYGT



...við dekkum á alnótini
WWW.NORMEK.FO
FO-512 NORÐRAGØTA
TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22

Lýsið við brúktum bilum





Mylnuhúsið

## søkir eftir pedagogum og hjálparfólki

Mylnuhúsið er ein samskipaður dagstovnur ið dagliga tekur ímóti 140 børnum í aldrinum 0-9 ár.

Vit hava vøggustovu, barnagarð, útibarnagarð og frítíðarskúla.

Vit leggja stóran dent á, at arbeiða út frá tí børnini eru hugtikin av, og tí leggja vit dagin til rættis eftir. Tað er av stórum týdningi at »lívskuffertið« hjá barninum verður tikið í størsta álvara.
Les meira á www.mylnuhúsið.fo

**Vit søkja eftir fólki til:**
- útibarnagarð 40 tíma viku
- frítíðarskúla 40 tíma viku
- barnagarð 30 tíma viku
- barnagarð 35 tíma viku
- útibarnagarð 35 tíma viku (barnaburðarfarloyvi)

**Vit ynskja okkum fólk sum:**
- eru fleksibul
- eru opin fyri nýhúgsan
- kunnu stuðla við góðum samstarvi á einum stórum stovni
- hava hug at arbeiða *saman* við børnum

**Vit bjóða:**
- eitt Mylnuhús í menning
- eitt Mylnuhús við nógvum børnum og vaksnum
- eitt Mylnuhús við góðum foreldra- og samstarvsfelagum
- eitt Mylnuhús har tað er pláss fyri, at bæði børn og vaksin kunnu seta síni »spor«

Størvini eru at seta 15. august 2004, um ongin pedagogur søkur, verður hjálparfólk sett í fyribilsstarv.

Lønar- og setunarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðan Hannu Thøgersen tlf. 457788/217789.

Umsóknir til størvini, saman við útbúgving og royndir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 30. juni 2004.

**Mylnuhúsið**
Mylnugøta 10
700 Klaksvík



# Sethús til sølu

Hús í Leirvík – við Garð 11 – eru til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 443242/504649**

FØROYA LANDSSTÝRI

**Mentamálaráðið**
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# Útbjóðing

**Ráðgeving í sambandi við byggiskrá og skipanaruppskot fyri nýggjan Fiskivinnuskúla í Vestmanna**

Mentamálaráðið bjóðar áhugaðum fyritøkum at geva tilboð upp á omanfyri nevndu ráðgevauppgávu. Byggiætlanin fevnir um ein nýggjan fiskivinnuskúla til uml. 100 næmingar, sum ætlanir eru um at byggja á fyrrverandi parkeringsøkinum Inni á Fjørð í Vestmanna. Byggingin skal fremjast við atliti at eini framtíðar víðkan av skúlanum við hølum til menningarætlanir og royndir fyri fiski- og alivinnuna.

Uppgávan fevnir um fylgjandi veitingar sambært »Ydelsesbeskrivelser - Byggeri og Planlægning«, PAR/FRI 2002:
- 1.2 Byggeprogram
- 3.1 Dispositionsforslag

Um vikið verður frá omanfyri nevndu veitingum, skal greitt tilskilast frá hvørjum, og grundgevast skal fyri, hví vikið verður frá.

Saman við tilboðunum skulu í minsta lagi hesar upplýsingar verða lagdar við:

- Virkisheiti, adressa, telefon- og telefaxnr., teldupostadressa
- Alment um virkið, virkisslag (firma /partafelag)
- Virkisbygnaður og samanseting (manning og fakbólkar)
- Kunnleiki/serkunnleiki, tilvísingar til arbeiði hjá virkinum
- Góðskutryggingarskipan
- Virkisheiti hjá møguligum undirráðgevum/konsulAentum
- Trú- og heiðurvánttan um møguliga almenna skuld
- Kostnaður fyri omanfyri nevndu veitingar

**Byggiskráin** skal verða liðug 15. oktober 2004, íroknað gransking og góðkenning.

**Skipanaruppskotið** skal verða liðugt 1. desember 2004, íroknað gransking og góðkenning.

Uppgávan verður tillutað tí tilboðsgevara, ið verður mettur at eiga tað tilboðið, sum er til størstan fyrimun fyri byggiharran. Henda meting verður grundað á, í hvønn mun tilboðsgevarin sannførir um sín førleika at loysa hesa uppgávuna og á mest gagnligan kostnað.

Um innkomnu tilboðini ikki eru sannførandi, tilskilar byggiharrin sær rætt ikki at taka av nøkrum tilboði.

Byggiharrin tilskilar sær rætt frítt at velja ráðgevar til framhaldandi projektering uttan mun til, hvør verður valdur til hesa uppgávuna.

Tilboð skulu stílast til Mentamálaráðið, og sendast til:

**Landsverk**
Tinghúsvegur 5
Postboks 78
110 Tórshavn

og vera Landsverki í hendi í seinasta lagi mánadagin 5. juli 2004, kl. 15.

Nærri upplýsingar um uppgávuna kunnu fáast við at venda sær til Ole Jensen, deildarleiðara á Bygningadeildini, tlf. 31 13 33.

**Mentamálaráðið**

# Hús í Klaksvík til sølu

Ognin Garðsendi 9 er til sølu um hóskandi boð fæst:

**Matr. nr.** 50b
**Grundøki:** 510 m²
**Húsini:** 112 m² í tveimum hæddum
70 m² innrættað í kjallarahæddini

Hetta er timburhús við betong grund bygd í 1978.
Útsýnið er sera gott yvir alla Klaksvíkina.

Nærri upplýsingar á
**tlf. 457791 frá 21. juni 2004**

**DNG.C6000I SNELLUR**

**Í juni og juli mánaði geva vit 11% í avsláttri, við keypi av minimum 2 stk.**
**AVMARKAÐ NØGD**



**Fa. Jóannes F. Dahl**, Maskinsmiður,
Tlf: +298 422 274, Fax: +298 422 189, Mobil: +298 221 000,
dam-dahl@post.olivant.fo, 460 Norðskála, Føroyar
UMBOÐ FYRI Vaki-DNG

Ps: Vit hava eisini tað vælumtókta Dynama nylon 1,1 mm á 250 m. Línuspøl og aðra útgerð til línu